

**TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** UG 156 **KM:** 56.000
**Árgangur:** 06.02.02 **Seinast sýnaður:** 06.02.02
**Viðmerking:** Klimaanlegg - fjarstýrt sentrallás - El-rútar/spegl - Radio/CD
**Útgjald: kr. 36.900,-** **Kr. 147.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1300 XLI**

**Skrásetingarnr.:** HL 448 **KM:** 177.000
**Árgangur:** 03.12.91 **Seinast sýnaður:** 01.02.05
**Kr. 38.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA FREETRONIC** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HM 192 **KM:** 45.000
**Árgangur:** 20.11.01 **Seinast sýnaður:** 14.02.05
**Útgjald: Kr. 21.650,-** **Kr. 86.000,-**



**CITROEN XSARA 2,0 HDI** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JG 709 **KM:** 55.000
**Árgangur:** 14.03.03 **Seinast sýnaður:** 14.03.03
**Viðmerking:** Aircondition - Fjarstýrt sentrallás - Elrútar o.a.
**Útgjald. kr. 32.150,-** **Kr. 128.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Stw.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MD 583 **KM:** 87.000
**Árgangur:** 29.09.98 **Seinast sýnaður:** 09.08.04
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - fløguspælara - krók - hæddarstilling av lyktum - 4 x airbags
**Útgjald kr. 34.510,-** **Kr. 98.000,-**



**FORD FIESTA 1,25**

**Skrásetingarnr.:** NL 906 **KM:** 78.000
**Árgangur:** 05.06.02 **Seinast sýnaður:** 05.03.02
**Útgjald. kr. 18.650,-** **Kr. 74.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** KL 802 **KM:** 130.000
**Árgangur:** 05.05.99 **Seinast sýnaður:** 14.06.04
**Viðmerking:** Aircondition - Fjarstýrt sentrallás - Radio/CD
**Útgjald kr. 36.260,-** **Kr. 103.000,-**



**FORD ESCORT 1,8**

**Skrásetingarnr.:** JV 127 **KM:** 198.000
**Árgangur:** 31.07.97 **Seinast sýnaður:** 14.01.04
**Kr. 45.000,-**



**TOYOTA CAMRY 2.2 I XL\GL**

**Skrásetingarnr.:** LF 544 **KM:** 221.000
**Árgangur:** 01.01.93 **Seinast sýnaður:** 05.04.04
**Kr. 40.000,-**



**KIA SPORTAGE 2,0 4X4 Vørubilur**

**Skrásetingarnr.:** TL 334 **KM:** 86.000
**Árgangur:** 10.10.97 **Seinast sýnaður:** 06.12.04
**Kr. 45.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu

**6 mánaða garanti**

Vitbjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar ið kosta
meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-,
fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, men fevnir ikki skyl
nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar el
tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingin smáir bókstavir
Kom og vitja okkum • landsins største bilsølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F


Fyrilestur við Klaus Kiesewetter:

# Frá Svalbard til Norður-eystur Grønland



**Kendi týski ævintýrarin og upptøkumaðurin, Klaus Kiesewetter, sum í mong ár búði í Føroyum, fer at halda fyrilestur í Oyndarfirði og í Saltangará í november. Fyrilestrarnir verða á føroyskum**

**FYRILESTUR**
*Tíðindaskriv*

Fyrilestrarnir vera í kjallaranum í handlinum hjá Eivind í Oyndarfirði mánakvøldið 14. november kl. 19.30 og í býráðshøllini hjá Runavíkar kommunu mikukvøldið 16. november kl. 19.30. Fyrilesturin tekur umleið 1½-2 tímar og kostnaðurin er kr. 30.

Heitið á fyrilestrinum hjá Klaus er "Frá Svalbard til Norður-eystur Grønland". Við nærmyndum av ísbjarnum, roysningum og kópum fæst ein áhugaverd uppliving.

## Eitt sindur um ferðina

Ferðin frá Svalbard til Norður-eystur Grønland í august/september 2004 var gjørd í einum lítlum fyrrverandi russiskum ísstyrktum havkanningarskipi, sum er ogn hjá fróðskaparsetrinum í Skt. Petersburg. Skipið hevur síðan fyrst í nítiárunum siglt við ferðafólki og verður leigað av fleiri altjóða fyritøkum við áhuga í arktisku leiðunum at sigla í økjum, har vanlig ferðamannaskip ikki kunnu sigla. Um summarið siglir skipið í Arktis og um veturin í Antarktis.

Skipið gongur 12-13 míl og er útgjørt við 5 zodiacs t.e.stórum gummibátum, ið verða brúktir til at sigla í land á serstøkum støð í næstan órørdari náttúru. Har fær ferðafólkið høvið til at eygleiða hvalir, kópar, sjófuglar á havinum ella t.d. moskusoksar á strondini ella at sigla gjøgnum ísin at síggja áhugaverdar ísfellur.

Manningin umborð er russisk. Klaus Kiesewetter legði túrin til rættis og var sjálvur ekspeditionsleiðari umborð.

Ferðin byrjaði í Longyearbýnum og leiðin gekk fyrst í útnyrðing framvið eystursíðuni á Svalbard og víðari eftir Hinlopensundinum til syðra enda av oynni Nordaustland, har siglt varð framvið longsta jøklinum í Europa, sum er 220 km langur. Farið varð í land á eini strond, har roysningar halda til.

Eftir at hava siglt aftur og fram gjøgnum Hinløpensundið varð kósin sett til Norð-eystur Grønland umleið 74 stig norður. Umleið 50 fjórðingar vestur úr Svalbard mátti sendast boð eftir eini bjargingartyrlu frá Longyearbýnum. Eitt ferðafólk við hjarta- og andatrupulleikum mátti flytast av skipinum til viðgerð í Longyearbýnum.

At enda eydnaðist at koma ígjøgnum ísin við norðureysturstrondina í Grønlandi 72 gradir norður og í land á Sabineoynni. Á hesi oynni vitjaði ferðafólkið leivdir frá 1. týsku Norðurpól Expeditionini í1872/73, leivdir frá norskum veiðusmáttum og leivdina av eini týskari veðurstatión fra 2. veraldarbardaga.

Síðan gekk leiðin framvið strondini sunnanfyri inn í vakrar og djúpar firðir við hópin av gomlum veiðusmáttum, stórum flokkum av moskusoksum og nógvum snjóharum suður til heimsins størsta fjarðaøkið, Scoresbysundfjørðin.

Farið varð í land 3 ferðir um dagin; um morgunin, seinnapartin og um kvøldið. Onkuntíð bleiv ferðafólkið vakt mitt um náttina um t.d. ein ísbjørn var nærhendis ella um norðlýsið sást.

Leiðin helt áfram suðureftir í Nanses fjørðin og haðani til Keflavíkar, har ferðin endaði.

Hetta er í stuttum tað, ið verður at hoyra og síggja á fyrilestrinum hjá Klaus Kiesewetter í kvøld, 14. november kl. 19.30 í Oyndarfirði og mikukvøldið 16. november í býráðssalinum hjá Runavíkar kommunu.

# Pornoplakatir av Frevert

Borgarstjóra valevnið í Keypmannahavn hjá Dansk Folkeparti, Louise Frevert vaknaði við kaldan dreym í morgun. Á eystaru brúgv hevði onkur hongt ónærisligar myndir av fyrrverandi pornosjónleikaranum upp.

Louise Frevert hevur sum heild havt eitt sera óheppið valstríð, ið byrjaði við, at hon noyddist at taka sera rasistiskar greinar av heimasíðu síni. Kommunuvalið í Danmark er í morgin, og eingin ivi er um, at myndin av borgararstjóra valevninum við fullum munni, er ringt at fáa burturúr tankunum á veg inn í atkvøðuboksina, tað tekur í øllum førum meira enn henda eina dagin.

**nud**